14. november 2025

Hoyringsskriv til hoyring av

“*Uppskoti til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakerv um (fyrireiking, prosjektering og útboð)*”

Økisfeløgini í Sandoynni fyri Tjóðveldi, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin vilja við hesum hoyringsskrivi vísa sína stóru ónøgd við tilgongdina í sambandi við suðuroyartunnilin.

Oyggin hevur í løtuni hvørki umboðan í Løgtinginum ella Landsstýrinum, tí er tað serstakliga átaluvert, at økisfeløgini ikki verða tikin við í avgerðir, ið hava beinleiðis ávirkan á oynna.

Á borgarafundi í Sands kommunu 12. november var greitt, at øll tey møttu peikaðu á linjuføringina norðan fyri bygdina, og greitt var, at kommunustýrið í sínum hoyringssvari eisini fer at vísa á ta loysnina. Undirritaðu økisfeløg eru samd um, at hetta er besta loysnin bæði fyri Sand og Sandoynna og er samstundis stytsta samlaða farleiðin til Suðuroynna.

Linjuføringin úr Djúpadali hevur flest neiligar avleiðingar fyri oynna, og tí er tað sera harmiligt, at náttúruárinsmetingar og aðrar neyðugar forkanningar ikki verða gjørdar av báðum linjuføringum, so at hesar kunnu gerast partur av einum fult upplýstum grundarlagi fyri støðutakan.

Sum er, so er viljin bert til gera náttúruárinsmetingar í Djúpadali, og tá er vónleyst at samanbera náttúruavleiðingarnar í teimum ymsu alternativunum. Hóast hetta, so brúkar Tunnilsfelagið júst náttúruavleiðingar á Sandsvatn og í Skúgvoy sum orsøk fyri, hví at tann leiðin hevur ov stórar avleiðingar. Tað ber tó ikki til at staðfesta, uttan at tað verður kannað.

Sands kommuna og sandingar flestir eru á einum máli um, at ferðslan til suðuroyartunnilin undir ongum umstøðum skal førast ígjøgnum Sand.

Harafturat verður økið rundan um Sandsvatn, Sandafløttin og sandin nýtt dagliga av skúla, barnagarði, barnafamiljum og fólki í Sands kommunu. Skuldi vegakervið til suðuroyartunnilin farið tvørtur um Sandafløttin, hevði hetta ikki borið til í mun til trygdina hjá sandingum, samstundis sum sami vegur hevði klovið bygdina í tvey, tá ið mongdin av bilum, ið ferðast tvørtur um Sandafløttin, hevði verið nógv størri enn tað, ið hon annars hevur verið. Hetta fer at merkjast fyri fólkið, ið her býr.

Vit hava sæð hetta fleiri ferðir fyrr, m.a. í Vágum, Leirvík og í Runavík. Í sambandi við eysturoyartunnilin varð ætlanin at leggja tunnilsmunnan við Toftavatn, men tað bleiv lukkutíð broytt, tá ið fólk gjørdu vart við hetta. Okkum nýtist ikki at gera sama mistak fleiri ferðir.
Sandsvatn, Mølheyggjarnir og velturnar eru serstakar fyri Føroyar og sterkasta vørumerki hjá Sandi og Sandoynni sæð frá einum ferðavinnusjónarmiði, men somuleiðis er tað sanniliga ein stór orsøk til, at fólk velja at búseta seg í bygdini. Um farleiðin til Suðuroyar í framtíðini fer at ganga tvørtur ígjøgnum bygdina, so verður tað til óbótaligan skaða fyri oynna.
Fólkatalið í oynni er í stórum vøkstri og hevur ikki verið størri síðani 2011. Hettar er sjálvsagt sandoyartunlinum fyri at takka. Sandoyingar skilja tí ómetaliga væl kravið hjá suðuroyingum um ein suðuroyartunnil. Talan er tí upp á ongan máta um at vera ímóti tunlinum, men at hann skal gerast við fyriliti fyri Sandoynni.
Hvussu væl undirsjóvartunnlarnir hepnast verður í stóran mun mált í, hvussu nógv akfør koyra ígjøgnum um samdøgri. Tess fleiri tess betri. Í mun til suðuroyartunnilin við núverandi ætlaðu farleið ígjøgnum Sand eru vit í tí margháttligu støðu, at tess betur suðuroyartunnilin hepnast, verri verður tað fyri okkum.

Undirritaðu økisfeløg krevja tí, at ein virðilig loysn verður funnin til vegaføringina ígjøgnum bygdina. Ein loysn má fyriliggja, áðrenn lógaruppskotið verður borið niðan í Løgtingið. Besta loysnin við atliti til ferðslu, bygdina og umhvørvið er linjuføringin norðan fyri bygdina. Í øðrum lagi kann ein tunnil ígjøgnum Traðarhamar verða ein loysn, men so skal tann tunnilin gerast, áðrenn farið verður undir at bora suðuroyartunnilin. Hetta fyri at fáa sum mest av arbeiðskoyringini burtur úr bygdini. Besta avgerð fyri bygdina, Sandsvatn o.a. er, um tunnilin kemur út so langt inni í dalinum sum gjørligt, helst innan fyri Meginskúlan.

Vegna
Sandoyar Tjóðveldisfelag,

Sandoyar Fólkafloksfelag,

og Sandoyar Sambandsfelag